

## Jarðbundin hetja

Tað var ótrúligt at uppliva nýggju føroysku superhetjuna, Pál Joensen, gjøgnum dagin í gjár, har hann var miðdepilin fyri »attension« av teirri aðru verð. Alla tíðina hevur hann verið eitt meiri enn virðiligt umboð fyri Føroyar. Hann er ikki maðurin við teimum stóru orðunum, men tað var týðiligt, at hann til tíðir var ógvuliga rørdur um alt tað hóvasták, ið gjørt var burtur úr honum. Tá hann sá, hvussu nógv var gjørt burtur úr í Vági í gjárkvøldið segði hann: Nú byrji eg at skilja, at eg má hava gjørt nakað veruliga stórt. Og vit onnur kunnu bara nikka samtykkjandi.

# Suðringar heiðraðu sínum






*Ein stoltur pápi, Kaj Joensen*

**Tað var ein heilt ótrúlig móttøka, sum Suðuroyggin gav svimjihetjuni og venjara hansara í gjárkvøldi. Pál Joensen og Jón Bjarnason vóru sera rørdir av øllum tí hóvastáki, sum oyggin gjørdi burturúr, tá teir komu heim**

MÓTTØKA
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*
*Jón Brian Hvidtfeldt*
*jonbrian@sosialurin.fo*
*Myndir: Talgilt*

Tað byrjaði so smátt á flogvøllinum í Vágum gjáramorgunin.

Ein stórur vatnbogi varð sprændur sum ein gullbogi yvir flogfarið, tá tað koyrdi inn av lendingarbreytini móti terminalinum. Og so var grundin líkasum løgd.

Hetta var fyrsta móttøkan av fýra, sum Pál og hansara ferðalið máttu ígjøgnum, áðrenn hann kundi leggja høvdið á koddan í gjárkvøldið.

Og tað má sigast, at tað gjørdist bara betri og betri.

Eftir at Magni Argi hevði sagt nøkur orð - sum annar av høvuðssponsorunum hjá Svimjisambandi Føroya - gekk leiðin til Havnar, har móttøka var fyriskipað av ÍSF, Svimjisambandi Føroya og Norðoya Sparikassa - sum er hin høvuðssponsorurin hjá SSF. Har nýttu fleiri høvið at heilsa upp á stóru svimjihetjuna úr Vági, millum onnur mentamálaráðharrin, Kristina Háfoss og tingformaðurin, Hergeir Nielsen.

Síðani gekk leiðin oman í Tinganes, har løgmaður tók ímóti. Men tað gjørdist samlaða landsstýrismanningin, sum var møtt upp at sýna sína virðing fyri hesari nútímans føroysku stjørnuni, sum, hóast nógv er gjørt burtur úr honum, framvegis hevur beinini trygt plantað á jørðini.

Sjálvt um fjølmiðlar sum so ikki høvdu atgongd til hesa fyri Pál Joensen, Jón Bjarnason, Kára á Høvdanum, Peturi Heðin á Fløtti og formanninum í Svimjisambandinum, Palla Ziskason, so skiltist á lagnum, at rættiliga konstruktivar samrøður fóru fram á hesum fundinum. So drúgvar, at tað var um reppið, at ferðalagið hjá Pál Joensen gjørdist ov seint til Smyril klokkan fýra.

### Fagnaðir

Smyril hevði ikki meira enn lagt frá landi, tá skiparin á brúnni umvegis hátalaran boðaði frá serligu ferðafólkunum henda túrin, og nógv nýttu høvi at heilsa uppá í matstovuni Beinisvørð, har eisini varð skipað fyri móttøku. Conrad Gaard Joensen, leiðari á Sjódeildini hjá Strandferðsluni, tók í síni heilsan vegna SSL skemtiliga til orðanna, at um so er at Pál Joensen hevði skund, so kundi hann altíð leypa á bláman og svimja seinasta teinin inn á Krambatanga - so kom Smyril seinni.

Tað var ikki frítt, at tárini trillaðu, tá Pál Joensen og venjari hansara, Jón Bjarnason, av dekkinum á Smyrli bóru eyga við ta stóru mannfjøld, sum varð savnað á Krambatanga fyri at taka ímóti.